Starvslýsing



# Góðskuleiðari til Faroe Seafood

Søkt verður eftir góðskuleiðara til Faroe Seafood Eysturoyar øki, at byrja so skjótt sum gjørligt. 2 fiskavirkir eru í Faroe Seafood Eysturoyar øki. Eitt stórt og sera framkomið flakavirki í Runavík og eitt sera framkomið saltfiskavirkið á Toftum. Bæði virkini framleiða til krevjandi kundar. Eisini er ein stór landingarmiðstøð og 9 trolarar í Eysturoyar økinum.

## Góðskuleiðarin kemur at arbeiða við hesum økjum:

- Leiða góðskuskipanina í tøttum samstarvi við formennirnar á ymsu deildunum
- Tryggja framhaldandi uppbygging og viðlíkahaldi av HACCP grundaðari innaneftirlitsskipanin á virkjunum
- Gjøgnumføra og luttaka í øllum skoðanum (1. part, 2. parts og 3. parts skoðanir, so væl sum skoðanir framdar av matvørumyndugleikunum).
- Samskifti við almennar matvøru-myndugleikar
- Tryggja neyðuga vitan um góðsku á virkjunum, gjøgnum innanhýsis talgildu útbúgvingar- og upplæringarskipan okkara.
- Reingerð og reinføri á virkjunum
- Heilsufrøðiligar starvsskipanir
- Reglugerðir (vørulýsingar og merkingar)
- Etikettuskipan
- Góðskuskrásetingar og góðskuskjøl
- Tekniskt kundasamstarv
- Klagur og klaguviðgerð
- Skrásetingar og eftirlit í rakstrinum í samráð við økisleiðaran.
- Vørumenning

## Fakligar førleikar

- Eina viðkomandi hægri matvøruástøðilig útbúgving ella verkfrøðingur, við royndum frá øðrum matvøruframleiðarum.
- Góðan kunnleika til KT og royndir við KT amboðum, m.a. office pakka, goymslustýring í Axapta og framleiðslustýringsskipanir
- Góðan kunnleika til HACCP grundað innaneftirlit og helst eisini kunnleika til BRC, IFS og aðrar líknandi matvøru-framleiðsluskipanir.
- Sera góðan kunnleika til enskt, bæði skrivliga og munnliga, er ein fyritreyt.

## Persónligar førleikar

Tínir persónligu eginleikar eru: opin, fyrikomandi og góð samstarvsevnir. Tú ert engagerað/ur, fleksibul og megnar at taka ábyrgd og avgerðir, eins og tú megnar at inspirera og motivera tínar starvsfelagar. Tú megnar at arbeiða í eini dynamiskari skipan og klárar at skapa struktur og yvirlit á ein dynamiskan og motiverandi hátt.

## Arbeiðstaður

Runavík

## Vit kunna bjóða:

- Eitt framkomið fakligt umhvørvi
- Eitt virkið og framkomið framleiðslu-umhvørvi
- Løn sambært avtalu

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Guðrið Andorsdóttir tlf. 555510.

Umsóknin skal sendast áðrenn 15. apríl 2009 til:

Faroe Seafood
att. Erlendur Johannessen
Postboks 68
FO-110 Tórshavn

FAROE SEAFOOD

GRENE AGRO

NÓGV GÓÐ TILBOÐ

ALOE VERA vætukrem
400 ml
50,-
Fyrr 73 kr




KAVPUMPA



1.525,-
Fyrr 2.325 kr

150,-
Fyrr 200 kr



SURRINGARBAND
Styrki 5000 kg
Longd 9,5 m

TOPPLYKLASETT
82 deilir



985,-
Fyrr 1.395 kr



KASSI til rossaútgerð
130,-
Fyrr 177 kr



GRAFIK STUDIO

Tilboðini eru galdandi fram til 14. apríl 2009

MBM BÚRØKT
Vegurin Langi 188 Hoyvík Tel 309005

– samstarvsfelagi hjá GRENE